VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin lot til andøvsgul av útsynningi og regn eitt skifti, seinni hækkar hann upp í útnyrðing og veksur vindin nakað. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið hósdagin:
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av vestri og regn. Hitin kemur upp í 7 til 10 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin um frostmarkið. Sunnudagin lot av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

76.000 krónur fyri hvørt parkeringsplássið

Pláss verður fyri 66 bilum á »grøna parkeringsplássinum«, sum verður gjørt við Jóannesar Paturssonargøtu í Havn. Tilsamans eru 150 nýggj parkeringspláss í gerð í Havn

PARKERING

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin

Stóri parkeringstrupulleikin í Havn verður nú loystur. Býráðið hevur seinastu tvey árini sett av átta milliónir krónur at bøta um parkeringsviðurskiftini í høvuðsstaðnum, og teir pengarnir verða nú allir brúktir.

Í gjár varð sett á at grava við Jóannes Paturssonargøtu í Havn, har eitt sokallað »grønt parkeringsøki« skal gerast millum Jóannes Paturssonargøtu og Rabarbukvarterið.

– Hetta er ikki bíligasta loysnin vit her hava valt, men vit hava valt at gera eitt vakurt parkerinsøki við grótlaging og plantum. Hetta verður eisini eitt trivnaðarøki, har fólk kunnu hugna sær, og gongurásir verða gjørdar, sum binda saman gøturnar kring økið saman, sigur Sjúrður Olsen, formaður í teknisku nevnd hjá Tórshavnar Býráð.

Tað er Robert Brockie, sum ger arbeiðið fyri kommununa. Hann hevði lægsta tilboðið, sum var upp á góðar 3,8 mió kr. Saman við eftirliti o. ø. útreiðslum, sum bundnar eru í ætlanina, fer nýggja grøna parkeringsøkið at kosta 5,3 milliónir krónur. Har verður pláss fyri 66 bilum.

– Tað gevur ein prís upp á 76.000 kr fyri hvørt parkeringsplássið, sigur Sjúrður Olsen.

Umframt parkeringsplássið við Jóannes Paturssonargøtu er Tórshavnar Kommuna farin at víðkað parkeringsplássið á Skálatrød.

– Har verða skúrarnir hjá kommununi tiknir niður. Soleiðis fáa vit gjørt 60 parkeringsbásar afturat har. Saman við víðkaða parkeringsplássinum aftan fyri politistøðina fáa vit tilsamans 150 nýggj parkeringspláss í Havn, sigur Sjúrður Olsen.

Í gjár fóru teir at grava út fyri nýggja parkeringsplássinum við Jóannesar Paturssonargøtu í Havn. Hetta verður ein »grønt« parkeringspláss, sum fer at hýsa 66 bilum
Mynd: Álvur Haraldsen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷17
Nuuk	÷5
Qaqortoq	1
Ammassalik	÷4
Saint John's	4
Halifax	2
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	5
Lerwick	6
Aberdeen	7
London	8
Tromsø	0
Bergen	5
Oslo	–
Stokkhólm	4
Keypmannah.	7
Helsinki	0
Moskva	6
Berlin	7
Warzawa	10
Kiev	11
Bukarest	16
Paris	10
Madrid	11
Róm	15
Malorca	11
Athen	15
Malta	15
Tunis	21
Beijing	14
New Dehli	34
Bangkok	34
Jakarta	32
Sydney	–
New York	0
Miami	23
Los Angeles	15
Meksikobýur	19
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	28

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst, 1033 hPa. sunnan fyri Ísland fer suðureftir og mennist. Eitt lágtrýst, 1003 hPa. eystan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og grynnist.



Lágtrýstið norðanfyri Ísland fer eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer í landsynning. Lágtrýstið við Hvarvið fer í landnyrðing og hitabrúgvin haðani kemur móti Føroyum og hevur eitt skifti lýggjari veður við sær.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 22/03 kl. 06⁰⁰– 23/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,9°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: <0,1 mm – mált frá 22/03 kl. 06⁰⁰–23/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 75,0 mm

VESTFALLSKYRRINDI

20. mars: Tendring
27. mars: Mánin longst frá jørðini
29. mars: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
24. mar	08.59	21.20	07.59	20.20	08.14	20.35	10.59	23.20	11.59	—	07.14	19.35	06.14	18.35	09.14	21.35	10.14	22.35	08.44	21.05	09.59	22.20
25. mar	09.42	22.04	08.42	21.04	08.57	21.19	11.42	—	00.20	12.42	07.57	20.19	06.57	19.19	09.57	22.19	10.57	23.19	09.27	21.49	10.42	23.04
26. mar	10.26	22.49	09.26	21.49	09.41	22.04	00.04	12.26	01.04	13.26	08.41	21.04	07.41	20.04	10.41	23.04	11.41	—	10.11	22.34	11.26	23.49
27. mar	11.12	23.37	10.12	22.37	10.27	22.52	00.49	13.12	01.49	14.12	09.27	21.52	08.27	20.52	11.27	23.52	00.04	12.27	10.57	23.22	—	12.12

5 707265 100036 >